# Bólkalívs-trygging

BANK**NORDIK**

### Bólkalívstrygging

Við Bólkalívstrygging frá NordikLív hevur tú møguleika at tryggja tíni avvarðandi fíggjarliga, um tú skuldi follið frá. Við lívstrygging verður ein upphædd útgoldin til tey, ið sita eftir, um tú doyrt innan 67 ára aldur.

### Hvør kann tekna Bólkalívstrygging?

Allir kundar í BankNordik, ið eru millum 18 og 51 ár, kunnu tekna eina Bólkalívstrygging. Tað er ein treyt fyri at fáa hesa trygging, at tú ert arbeiðsfør/ur, frísk/ur og kanst útflýggja eina nøktandi heilsuváttan. Av tí at Bólkalívstrygging frá NordikLív ikki ávirkar aðrar lívstryggingar, ber til at tekna hana, sjálvt um tú eisini hevur trygging aðrastaðni.

### Prísur og tryggingarupphæddir

Lívstryggingin verður teknað sum ein bólkalívstrygging, har tú kanst velja millum ymiskar tryggingarupphæddir. Upphæddin sum fellur til útgjaldingar við deyða, kann verða upp til kr. 1.700.000. Fyri hvønn tryggjaða kann samlaða tryggingarupphæddin fyri Bólkalívstrygging og Restskuld-artrygging ongantíð fara upp um kr. 3.400.000.

| Tryggingarupphædd | 575.000 kr. | 800.000 kr. | 1.150.000 kr. | 1.700.000 kr. |
|---|---|---|---|---|
| Gjald um mánaðin | **143,75 kr.** | **197,71 kr.** | **281,75 kr.** | **413,67 kr.** |

### Útgjald

Lívstryggingin verður útgoldin til tín næsta avvarðandi, um tú doyrt í tryggingartíðarskeiðinum. Um tú ynskir, at upphæddin við deyða skal ognast øðrum enn næsta avvarðandi, er møguligt at útfylla eitt oyðublað um broyting av tilskilan. Tryggingarupphæddin verður útgoldin skattafrítt, tó skal arvagjaldið rindast. Neyvari treytir fyri útgjaldi eru at finna í tryggingartreytunum fyri Bólkalívstrygging.